# Dansk Kennel Klub føra ættarbøkur í Føroyum



**Skal tín ættarførdi hundur hava hvølpar? Ella ynskir tú tín racureina hund ættarførdan? Les so víðari, tí Dansk Kennel Klub ger her vart við møguleikarnar, ið nú standa føroyingum í boði**

TÍÐINDASKRIV

Í fleiri øldir hevur menniskjað verið áhugað í at venja góðar hundar. Eitt av góðu amboðunum er at føra ættarbók.

Ein ættarbók er eitt skjal, sum gevur neyvar upplýsingar um hundin og forfedrar hansara. Hesar upplýsingar hava sjálvandi bert virði, um til ber at líta á teir, tí í hesum døgum kunnu øll gera sær eitt tílíkt skjal við telduni. Tí hevur trúðvirðið hjá tí felagskapi, sum útskrivar ættartalvuna, stóran týdning.

Dansk Kennel Klub (DKK) er elsta felag fyri hundar og hundaeigarar í Danmark. Felagið var stovnað í 1897, og hevur Hansara Kongeligu Hátign Prins Henrik sum protektor. DKK hevur 27.000 limir í høvuðsfelagskapinum, og umleið 45.000 limir í dóttirfeløgunum.

Í tøttum samstarvi ímillum høvuðsfelagskapin og dóttirfeløgini, verður avgjørt hvørji heilsukrøvini – og onnur møgulig krøv, skulu verða lokin, fyri at hesi ymisku hundasløgini kunnu verða ættarbókaførd. Hetta tryggjar so góða hundagóðsku sum gjørligt. Á heimasíðuni www.dansk–kennel–klub.dk síggjast krøvini, ið verða sett, fyri at hundar kunnu fáa ættarbók.

## Hundaviðurskifti í Føroyum

Tað eru longu umleið 100 ættarbókaførdir hundar í Føroyum. Flestu teirra koma úr Suðurdanmark. Men tá ið hesir hundar so fáa hvølpar í Føroyum, er tað sjáldan, at hvølparnir verða ættarbókaførdir. Nakrir eigarar hava sagt, at tað er orsakað av, at tað er torført at uppfylla krøvini til lívdjórini. T.d. eru nøkur av heilsukrøvunum ógjørlig at uppfylla, tí neyðugu kanningarnar ikki kunnu gerast í Føroyum. Kanska orsakað av serútgerð, ið djóralæknin ikki hevur.

Fyri at hjálpa hesum føroysku hundaeigarunum, hevur DKK tikið avgerð um, at føroyskir hvølpar, sum eina royndarskipan fram til árslok 2006, kunnu ættarbókaførast í DKK, um bert bæði lívdjórini hava eina, av DKK, góðkenda ættarbók.

Av og á eru eisini føroyingar, ið seta seg í samband við DKK, tí hundar teirra, ið eru av reinum slag, als ikki hava nakra ættartalvu. Í hesum førum kann stjórnin í DKK føra hundin fyri ein viðurkendan dómara, ið síðani tekur støðu til, um hundurin er av so reinum slagi, at hann kann fáa ættarbók frá DKK.

Fyri at DKK kann fáa innlit í hvussu stórur tørvur er á hesum slagnum av ættarbókaføring, fer DKK nú at gera ein »ansøgningsliste«, har hundaeigarar, ið ynskja at fáa hundin góðkendan til ættarbókaføring, kunnu skriva seg upp, áðrenn árslok 2004.

Farast skal inn á www.dansk-kennel-klub.dk, undir »Sidste nyt«, undir punktinum »Fremstilling - Færøerne« her ber eisini til at finna aðrar upplýsingar.

**–eys–**

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 42, 2004
www.kaupthing.fo

# Færri nýggj størv í USA

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var merkt av, at amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri septembur varð kunngjørd fríggjadagin. Orsakað av alstóra týdninginum frágreiðingin hevur, vóru fíggjarmarknaðirnir í bíðistøðu størsta partin av farnu viku. Arbeiðsloysið varð óbroytt á 5,4%, men frágreiðingin vísti, at einans 96.000 størv vóru sett á stovn í septembur móti teimum væntaðu 148.000. Fíggjarmarknaðirnir gjørdust tískil vónbrotnir; lánsbrævarentur og partabrøv lækkaðu og dollarin viknaði. Fleiri glottar vóru kortini at hóma í frágreiðingini, men orsakað av ódnini Ivan er stór óvissa í tølunum.

Hóast arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin veruliga var í andglettinum í farnu viku, so megnaði oljuprísurin aftur at gera vart við seg. Brentoljan hækkaði úr 46 upp í heilar 49 dollarar fyri tunnuna, og er nú hækkaður meir enn 20% seinasta mánaðin. Aftur er tað tann sera høgi eftirspurningurin, saman við óttanum fyri, at framleiðslan verður tarnað av til dømis verkfalli ella yvirgangi, sum hevur verið orsøk til hækkandi oljuprísin. Haraftrat varð kunngjørt, at amerikonsku oljugoymslurnar hækkaðu minni enn væntað.

Týsdagin kemur týska ídnaðarálitistalið ZEW, og annars mugu vit eisini hesa vikuna bíða til fríggjadagin eftir spennandi lykatølum. Tá koma m.a. tøl fyri smásøluna og ídnaðarframleiðsluna í USA fyri septembur, sum eru týðandi fyri metingina av búskaparligu støðuni, og tí eisini fyri lánsbrævarentur og partabrævakursir. Bæði hesi tølini eru væntað at gerast hægri enn fyri avgust og tískil vísa á eina betrandi búskaparstøðu.

Roknskaparkunngerðirnar eru nú veruliga farnar av bakkastokki. Í farnu viku kunngjørdi General Eletrics roknskap, ið var júst sum væntað. Roknskapir fara nú aftur at seta dám á fíggjarmarknaðirnar; hesa vikuna kunngera m.a. risarnir Yahoo!, Philips, Intel, Apple, Nokia og General Motors. Sum heild stendur væl til í USA. Tískil væntar Kaupthing, at roknskapirnir verða góðir og fara at stuðla undir partabrævagongdini. Viðvíkjandi rentunum hevur oljan enn størsta týdning. Lækkar oljan, so hækka lánsbrævarenturnar og umvent.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,49% | -0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,40% | -0,11% |
| 10 ára lánsbræv | 4,28% | -0,07% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 282,4 | -1,0% |
| OMX, Svøríki | 718,4 | -1,1% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.807,1 | -0,6% |
| S&P 500, USA | 1.122,1 | -1,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,60 | 0,2% |
| Evru Lánsbrøv | 168,16 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 84,54 | -0,7% |
| Altjóða Vøkstur | 60,94 | 0,2% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 599,73 | -1,0% |
| EUR | 743,99 | 0,0% |
| GBP | 1.077,24 | -0,3% |
| NOK | 90,39 | 0,8% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Fólkaheilsuætlanin 2005-15 á veg



**Nú kemur hon umsíðir - fólkaheilsuætlanin, sum vit øll hava bíðað eftir, og sum skal fremja nógva tosið í verki. Málini eru stungin út í kortið, og ætlanin fyri, hvussu tey skulu røkkast, er løgd. Og longu nú eru fyrstu slóðbrótandi átøkini á heilsuøkinum á veg**

FÓLKAHEILSA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



Matvørulógin skal koma at virka, børnini fáa frukt, mjólk og nýggja lærugrein um heilsu í skúlanum og øll skulu hava verulig tilboð, sum fyribyrgja sjúkum, ið standast av skeivum livihátti. Hetta er bert eitt sindur av tí, vit kunnu vænta okkum, nú Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, saman við fakfólki innan heilsu hevur sett orð á, hvussu farast skal fram næstu 10 árini fyri at tryggja okkum øllum betri heilsu.

## Byrjað á null

Tað er lítið at ivast í, at landsstýrismaðurin er rættiliga spentur, nú fyrsta útkastið til Fólkaheilsuætlanina 2005-15 liggur á borðinum, tí sum hann sigur

- Hetta er úrslitið av einum arbeiði, sum mátti byrjað á punkt null, tí hetta er fyrstu ferð, føroyskir politikarar og myndugleikar í felag hava sett seg niður at orða ein yvirorðnaðan fólkaheilsupolitikk.

Meðan flestu heilsuátøk higartil mest sum bara hava verið eitt prik her og har, fevnir Fólkaheilsuætlanin um allar teir sonevndu vandatættirnir, royking, rúsdrekka/rúsevni, vantandi rørslu, skeivar matvanar og ferðslu. Fyri hvønn vandatátt skal greiða fáast á, hvussu støðan er nú, hvørjum málum vit vilja røkka og hvussu vit røkka teimum eftir eini neyvari ætlan fyri leiklutinum hjá politikarum, einstaklingum, stovnum og feløgum.

## Vegurin fram

Undir felags yvirskriftini „Vegurin fram" verður mett um, hvar tað fyribyrgjandi arbeiðið skal byrja, og hvør hevur ábyrgdina av at gera hvat.

Hans Pauli Strøm ásannar, at í summum førum verður neyðugt at endurskoða ella gera nýggja lóggávu sum lið í tí fyribyrgjandi arbeiðinum. Hann nevnir eitt nú matvørulógina, sum sambært landsstýrismanninum ongantíð hevur verið annað enn ein rammulóg við nøkrum kunngerðum. Í hesum føri kunnu vit staðfesta, at lóggávan og harvið politiski myndugleikin hevur slept brúkarnum uppá fjall og tískil hevur ábyrgdina av, at gera tær lógarbroytingar, sum skulu til fyri at tryggja tí framhaldandi fyribyrgjandi arbeiðinum.

Fyri allar vandatættir gongur vegurin fram gjøgnum upplýsing, tilráðing og verulig tilboð um fyribyrging av liviháttasjúkum. Her liggur stóri parturin av ábyrgdini hjá tí einstaka, sum má vera til reiðar at fylgja tilráðingunum og brúka tey tilboð, hann fær.

## Føroysk ætlan

Hóast londini rundanum okkum leingi hava havt ein heilsupolitikk, fer føroyska Fólkaheilsuætlanin ikki at dúva uppá royndir, sum eru gjørdar aðrastaðni. Støðið verður tikið í føroyskum viðuskiftum, og út frá tí skulu vit gera okkara egnu heilsukanningar og leggja ætlanir, sum hóska til føroysk viðuskifti. Skulu broytingar gerast, verður tað út frá egnum royndum og kanningum av teimum úrslitum, sum vísa seg, sum frá líður.

Higartil hevur arbeiðið við Fólkaheilsuætlanini 2005-15 verið gjørt í almanna- og heilsumálaráðnum, men í næstum verður farið undir at fáa hini ráðini við, so endaliga uppskotið kann leggjast fyri tingið seinni í vetur ella í vár.

Við í arbeiðsbólkinum aftanfyri Fólkaheilsuætlanina hava verið umboð fyri deildina fyri arbeiðs- og umhvørvisheilsu, kommunulæknafelagið, fyribyrgingarráðið, heilsufrøðisskipanina, landslæknin umframt landstýrismannin í almanna- og heilsumálum.

# Ókeypis mjólk til øll skúlabørn

**Longu frá 1. januar fáa øll føroysk skúlabørn ókeypis mjólk og frukt í skúlanum, og pengingur er settur av á fíggjarlógini.**

FÓLKAHEILSA
*Anna V. Elingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Sum kunnugt hava fleiri skúlar longu eina mjólkaskipan, sum foreldrini sjálvi gjalda. Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, metir tó skipanina hava so stóran týdning, at hon skal gerast ókeypis á øllum skúlum í Føroyum - samstundis sum hon eisini skal umfata eitt fruktískoyti.

Ókeypis mjóka- og fruktskipanin er liður í nýggju fólkaheilsuætlanini, sum má sigast at raðfesta børnini høgt. Í løtuni situr nevniliga eisini ein arbeiðsbólkur og orðar lesiætlanina til nýggju lærugreinina Heilsukunnleiki, sum ætlandi skal byrja í fólkaskúlanum komandi skúlaár.

## Dagføra matvørulógina

Samstundis leggur Fólkaheilsuætlanin upp til at endurskoða og dagføra matvørulógina. Hans Pauli Strøm ásannar, at verandi matvørulóg als ikki virkar eftir ætlan, tí hon setur alt ov fá og óneyv krøv til upplýsingar um tær ymsu matvørurnar. Hans Pauli dugir ikki at siga, hvussu langa tíð ein slík dagføring fer at taka, men leggur dent á, at málið í øllum førum er at fáa veruligar vørulýsingar við orkubýti og tilsetingarevnum á allar vanliga matvørur - eisini tær føroysku.

# Avgjøldini ikki heilsupolitisk

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, tekur fult undir við nýggja uppskotinum um at leggja avgjøld á sodavatn og tubbak, og vísir aftur, at hesi skulu vera tilvildarlig og órættvís. Tvey fakfólk innan heilsu vóru við í fyrireikandi arbeiðinum, og sodavatn og tubbak vórðu vald út, tí hesar vørur eru bæði skaðiligar og sera nógv útbreiddar millum fólk, sigur Hans Pauli. Hann dylur kortini ikki yvir, at tolltekniskir trupulleikar eisini hava spælt ein leiklut fyri, hvørjar vørur vórðu valdar út, meðan aðrar sluppu undan.

Spurdur, hví sukurfrítt sodavatn ikki sleppur undan avgjaldinum, sigur Hans Pauli, at tað, at sodavatn er sukurfrítt, ikki merkir tað sama sum, at tað er heilsugott. Vanliga innihalda slíkir drykkir nógv ymisk tilsetingarevni, sum langt frá kunnu metast at vera heilsufremjandi, vísir Hans Pauli á.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at nýggju avgjøldini ikki skulu síggjast sum eitt heilsupolitiskt átak í sær sjálvum og fílist á, at heitið "heilsutollur" hevur verðið brúkt í hesum sambandi.

- Avgjøldini eru fyrst og fremst ein liður í at økja um inntøkurnar hjá landskassanum. At tey so eisini kunnu vera við til at tálma nýtsluni av nøkrum heilsuskaðiligum vørum, eiga vit bara síggja sum ein eyka vinning fyri almennu fólkaheilsuna, sigur Hans Pauli og leggur afturat, at eftir ætlan skal ein partur av inntøkunum frá avgjøldunum nýtast til heilsufremjandi átøk fyri skúlabørn.

*-ave-*